

# Leys størv í Tórshavnar kommunu

## Hjálparfólk til Dagstovnin Látrið

Søkt verður eftir einum hjálparfólki at arbeiða 20 tímar um vikuna at byrja skjótast til ber. Talan er um eitt fyribilsstarv fram til 30. juni 2008.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Umsókn**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Dagstovninum Látrið, 270 Nólsoy í hendi seinast mánadagin 19. november 2007.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Lis Nolsø, stovnsleiðara, telefon 30 24 62.

## Pedagogur til Býlingshúsið í Maritugøtu

Søkt verður eftir einum pedagogi til barnagarðsstovu at arbeiða 30 tímar um vikuna at byrja 1. desember 2007.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Umsókn**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndum skal vera Býlingshúsið í Maritugøtu, Maritagøta 50, 100 Tórshavn í seinasta lagi fríggjadagin 16. november 2007.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Ingu-Mariu Amandusardóttir, stovnsleiðara, ella Nancy Hentze, varaleiðara, á telefon 30 24 00 ella 27 29 29.

## Søkt verður eftir húsavørði til Ellis- og umlættingarheimið

Eitt fulltíðarstarv sum húsavørður er leyst at søkja at seta skjótast gjørligt.

**Starvsøki fevnir um**
- Ellisheimið og økið uttan um
- Umlættingarheimið og økið uttan um
- Bilin

**Ábyrgdarøki**
- Vanligt viðlíkahald av bygningum, útbúnaði, bili og økinum rundan um húsini
- Ábyrgd og eftirlit við el-skipanini, tekniska útbúnaðinum, eldsløkkiskipanini og burturbeining av ruski
- Hagreiða kjøt, fisk, grind og annan mat í samráð við køksstarvsfólki
- Flutning av búfólki og ørindum annars

**Vit vænta, at tú**
- hevur handverkara-, maskin- ella líknandi útbúgving
- hevur stóra koyrikorti ella ert til reiðar at taka tað
- kanst arbeiða sjálvstøðugt, átaka tær fjølbroyttar uppgávur og ert røkin
- ert lættur at samstarva við bæði hjá bú- og starvsfólki

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Umsókn**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, FO-110 Tórshavn í seinasta lagi fríggjadagin 16. november 2007.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Idu Sørensen, leiðara, á telefon 31 73 39 ella 21 73 39.

**Lesið meira um onnur størv á www.torshavn.fo**

Tórshavnar kommuna